# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Hittust eftir 50 árum

Fimmti ár eru ikki fimmti dagar. Tað máttu tey ásanna, nú tey eru farin at nærkast pensjónsaldri.

Fyri 50 árum síðani konfirmeraðust tey í Hvalba og eitt vikuskifti herfyri hittust tey aftur at minnast farnar dagar.

Konfirmantarnir vóru 13 í tali, og teir vóru allir 13 møttir upp aftur til hetta 50 ára minnið.

Tey møttust fyrst í Missjónshúsinum í Hvalba leygarkvøldið, har tey fingu náttturða.

Har heilsaðu tey upp á hvønn annan, og lívliga varð prátað um tíðina, tá ið tey gingu at lesa. Nøkur av teimum høvdu enntá ikki sæst síðani tá.

Sunnudagin fóru tey í Kirkju í Hvalba, har Jette Paarup, prestur, prædikaði. Altargongd var, og tað vóru øll við til. Aftaná fóru tey aftur í Missjónshúsið, har tey fingu góðan døgurða, og har vórðu tey sitandi til stundin var komin, at tey, sum skuldu norður um fjørð aftur, máttu umborð á Smyril.

Tað var Poul Jacobsen, prestur, um konfirmeraði tey. Hann búleikast í Danmark og varð boðin við. Men hann er komin so mikið væl til árs, at hann bjóðaði ikki til at ferðast til Føroya, men hann sendi gomlu konfirmantunum eitt vakurt blómutyssi í sambandi við dagin.

Á eldru myndini síggjast konfirmantarnir, sum tey sóu út, tá ið tey vórðu konfirmerað. Á nýggjaru myndini sæst, hvussu tey síggja út í dag, 50 ár seinni. Tey standa í akkurát somu raðfylgju á báðum myndunum, men á nýggju myndini stendur Jette Paarup, prestur, fremst vinstrumegin.





Aftast frá vinstru Geir Jónsson, Danmark, Johan í Giljum, Klaksvík, Elmar Skaalum, Hvalba, Verning Thomsen, Sandvík, Niels Pauli Thomsen, Hvalba, Levi Niclasen, Hvalba, Elberg Klettheyggj, Sandvík, Knút Guðjónsson, Klaksvík og Gert Joensen, Tórshavn

Fremst frá vinstru: Jette Paarup, prestur, Marjun Poulsen, Tórshavn, Margith Lisberg, født Midjord, Hvalba, Oddvør Mikkelsen, fødd Holm, Danmark og Sælbjørg Niclasen, fødd Holm, Tvøroyri.

†

## Andlát og jarðarferðir

Absalon Matras Absalonsen, Viðareiði, andaðist á Norðoyar Røktarheimi týskvøldið, 78 ára gamal.

**Brúdleyp**

Leygardagin 07.07.07 klokkan 15.00 giftast í Leirvíkar kirkju, Signa Skorastein, Leirvík og Hans Pauli við Misá, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl 19.00

**Dagurin**

**7. juli.** Villebaldus, deyður í 787. Saman við pápa sínum Rikardi og bróðurinum Vunibaldus gjørdi hesin enski munkurin pílagrímsferð til Róm og var tann einasti, ið kom fram. Seinni gjørdist hann biskupur í Eichstadt í Bayern.

**8. juli.** Ketil biskupur. Hesin biskupurin í Würtsburg í Týsklandi var ættaður úr Skotlandi. Sankta Kilian, sum hann varð róptur, varð saman við feløgum sínum Totnan og Kolonat tikin av døgum í árinum 689. Í Norðurlondum fekk hann navnið Ketil, ið eisini hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum. Navnið merkir hattur ella hjálmur.

**9. juli.** Sostrata. Hetta grikska kvinnunavnið er einki kent halgimennisnavn. Dagurin hevur borið ymisk onnur nøvn, men frá árinum 1726 kemur navnið Sostrata í álmanakkarnar.